**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI ØKIÐ MILLUM ÁARVEGIN, HÚSABRÚGV og BRINGSNAGØTU**

SB_Tórshavn_Áarvegur_1972_5_2024

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað sum sýnt er á viðfesta skjali 1, matr. nr. 69b, 70, 71, 72a, 72c, 73, 74, 75, 76, 77a, 78, 79, 80, 81, 82a, 82b 82c, 83, 85, 87, 89a, 89b, 90 og litra y, z, æ og ø, og partar av litra x, alt í Tórshavnar kommunu, og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa bústaða- og miðstaðabygging í økinum, samsvarandi skjali 1 og 2.

Stk. 2. Økið liggur í 1. grundumráði, sum sambært almennu byggisamtyktini er ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðarbygging.

Stk. 3. Sambært kap. II, § 1, stk. 2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett fyri 1. grundumráði, at í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki,  víkjast frá ásetingum um byggistig, nýtslustig og hædd.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtyktini, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3.  NÝTSLA ØKISINS OG ÁSETINGAR Í ØKJUNUM

Stk. 1. Økið verður lagt til handilsbúðir, skrivstovur, fyrisiting, heilsubótarhøli og tílíkt. Tvær ella tríggjar av teimum ovastu húsahæddunum í eini møguligari samlaðari nýbygging kunnu, eftir nærri góðkenning býráðsins, verða innrættaðar til íbúðir.

Ognirnar matr. nr. 70, 80, 85, 89b og 90 kunnu eftir nærri góðkenning býráðsins, allar sum tær eru ella lutvís, verða nýttar til bústaðir.

Matr. nr. 89a, verður kannað til hotel.

Á økinum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki, royki, deymi, gangi, ristingum ella við útsjónd kann vera teimum, ið uttanum búgva, til ampa.

Stk. 2. Við umbyggingum innan økið sýnt í skjali 2, má byggistigið á ongari ogn verða størri. Innan økið kann bert verða umbygt og bygt afturat eftir heildarbyggiskipanum, ið eru góðkendar av býráðnum.

Stk. 3. Mest loyvdu hæddir eru sum sýndar á skjali 1.

## §4. PARKERING OG VEGIR

Stk. 1. Parkering kann skipast á økinum, ið er lagt av til parkering, sí skjal 2.

Stk. 2. Vegir og parkering skulu annars gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og Bygningskunngerðini 2017.

## §5. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifulltrúan.

Stk. 2. Til húsasíður, skjøldrar og tekjur skulu ikki nýtast litir og tilfar, ið eftir meting býráðsins kunnu lýta økið.

Stk. 3. Dámurin í økinum skal varðveitast í trá við dámin á útvaldum bygningum í økinum, sí skjali 3.

Stk. 4. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §6. BYGGINMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk,

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 24/22394 |
| Ætlanarskriv: | |
| Góðkent: | 20-11-2024 |
| Váttað: | |

**Hæddaravmarkingar**

Bygging millum Húsabrúgv og Bringsnagøtu

Hæddaravmarkingar eru í lutfalli til
miðlinju á bygningsframsíðu




**Serstøk byggisamtykt nr. 5**
Áarvegur millum Húsabrúgv og Bringsnagøtu

TÓRSHAVNAR KOMMUNA
Býarskipanardeildin

| Dagfesting: | Myndevni: | Mátilutfall |
|---|---|---|
| Dagf. 15.02.2024 | Longdarskurður Hæddaravmarkingar | 1:700 / A4 |

| Skjal nr: | Teknað: | Góðkent: |
|---|---|---|
| 01 | JL | BW |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | |
|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri økið millum Áarvegin, Húsabrúgv og Bringsnagøtu |
| **Undirheiti** | Skjal 2 |
| **Mát** | 1:500 |

| **Dagur** | 23.11.2023 | **Journal** | 23/02842 | **Tekna** | RVH |
|---|---|---|---|---|---|











**Tórshavnar Kommuna**

**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri økið millum Áarvegi, Húsabrúgv og Brigsnagøtu | | | | |
| **Undirheiti** | 3 | | | | |
| **Mát** | | | | | |
| **Dagur** | 24.11.2023 | **Journal** | 23/02842 | **Tekna** | |